Oslo:

# Býurin við blómandi handilslívinum

**Oslo hevur eitt sera ríkt handilslív við eini ørgrynnu av ymiskum sølumiðstøðum. Mongu matstovurnar bjóða eisini ein góðan bita, og náttarlívið er alt annað enn keðiligt. Ert tú troyttur av øllum resinum, so hevur Oslo harafturat nógvar grønar lundir, har til ber at taka sær av løttum**

SUMMARKAPPINGIN
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Oslo hevur ørgrynnu av møguleikum, tá tað snýr seg um mentanarlívið. Til ber at vitja søvn, bæði søgulig og listarlig, lurta eftir tónleik, hyggja eftir dansi ella ítrótti, keypa ella bara sita á eini kaffistovu og eygleiða tað, ið fer fram í býnum.



*Oslo er ein býur við nógvum stórum lundum. Vigelandsparken er ein tann kendasta, og har standa fleiri vakrar standmyndir eftir kenda listamannin, Gustav Vigeland*

### Býurin umgyrdur av vakrari náttúru

Tá talan er um list, so er býurin væl prýddur við standmyndum. Serliga er hetta galdandi í Vigelandsparken, har til ber at síggja 212 standmyndir av kenda listamanninum Gustav Vigeland. Fólk í Oslo eru røsk av vitja lundina, eins og túsundatals ferðafólk vitja hana hvørt ár. Um summarið síggjast fólk serliga sóla sær, renna, spæla fótbólt og flogbólt í lundini.

Oslo er annars ein býur, ið liggur tætt at náttúruni. Hann liggur við sjógv, umgyrdur av fjøllum, og í sjálvum býnum er hópin av grønum blettum. Alskins lundir prýða um stórbýin Oslo. Umfram Vigelandsparken, so eru eisini aðrar kendar, vakrar lundir í býnum. Nevnast kunnu m.a.

### Handilsgøtur og sølumiðstøðir

Oslo er eisini býurin, ið setur handilsgøtur og sølumiðstøðir í hásæti. Í miðbýnum við Karl Johans gøtu eru hópin av handlum. Í teimum báðum gongugøtunum, sum eru í Oslo, eru kendir handlar sum H&M og Benneton, og í hesum umráðnum eru eisini fleiri stórar sølumiðstøðir, bæði við merkivørum og bíligari vørum. Sølumiðstøðirnar eru eisini væl útgjørdar við bæði kaffistovum og matstovum. Av sølumiðstøðum kunnu m.a nevnast Gunerius, sum liggur mitt í býnum, Oslo City og Paleet, sum er ein sølumiðstøð, ið serliga er kend fyri síni listaverk. Hon leggur ikki dent á stór lýsingarskelti, men vitjandi kunnu í staðin hyggja at standmyndum, sum hon hevur lænt frá Billedhoggerforeningen ella eftir málningum, sum eru læntir frá ymiskum listasøvnum.Á einum av veggjunum hongur ein málningur av sjálvum Edvard Munch. Hesin málningur er keyptur til sjálva sølumiðstøðina.

Móti er eisini list, og í Paleet verða fleiri altjóða merki seld á einum stað enn nakra aðra staðni í Oslo.

### Matur og drekka

Oslo er kendur fyri at hava góðar matstovur við hampiligum prísum. Norsku kokkarnir eru í heimsflokki, og fleiri matstovur í Oslo hava hesar kokkar. Matarskráirnar eru fjølbroyttar. Til ber at velja ímillum bóndakost, fiskarættir, villdjórakjøt, reinsdjórakjøt og rættir úr fremmandum londum

Náttarlívið í Oslo er alt annað enn keðiligt. Í býnum er eitt ótal av vertshúsum, kaffistovum og náttklubbum at velja ímillum, og býurin er hugnaligur um náttina, og hugalagið gott. Í Oslo leggja tey seg eftir at taka til sín nýggjan náttarlívsmóta úr øðrum londum, og tey góðu støðini í náttarlívinum skifta frá eini viku til aðra. Flestu verthús og náttklubbar í Oslo hava opið til kl. 03.00.



*Puntur nummar 12 av 23*





Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600,
Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari